# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Lurtið eftir Boga!

Tað er ein ómetaliga stórur heiður, at Bogi Hansen, ein av okkara fremstu granskarum, hevur fingið norðurlendsku umhvørvisvirðislønina. Henda virðisløn er ein sera stór altjóða viðurkenning fyrst og fremst av granskaranum Boga Hansen, men ikki minst av tí stóra og sera vælkvalificeraða granskingararbeiði, ið fer fram víða hvar av tí árini, sum menniskjans virksemi hevur á havumhvørvi og veðurlag. Vit kunnu so loyva okkum at leggja afturat, at nakað av hesum heiðuri drýpur á alla ta føroysku tjóðina. Landsmenn fegnast av heilum og reinum hjarta, tá tað gongst einum av okkara væl og tá ein føroyingar megnar at gerast kendur fyri tað góða úti í stóru verð. Vit hava ikki so nógv av slagnum.

Tann, sum á eitt nú DR 2 lurtaði eftir orðaskiftinum um tiltøk móti óhepnum og vandamiklum veðurlagsbroytingum, legði til merkis, at fleiri av røðarunum siteraðu takkarrøðu Boga Hansens, har, ið hann sigur, at nú mugu politikkararnir átaka sær eina ábyrgd fyri gongdini. Hetta vísir, at tað ber til at fáa politikkarar at lurta. Nú mugu og skulu politikkarar lurta eftir granskarunum og teirra ávaringarrópum. Tað er ein ómetaliga stór ábyrgd, ið nú liggur á herðum politikkarana. Sum støðan nú er vorðin, kann eingin politikkari koma og pástanda, at hann ikki visti betur. Nú vita øll, sum hava eygu og oyru, at vandi er á ferð, og at vit mugu broyta kós ongantíð ov skjótt.

Vit hava øll eina stóra medábyrgd. Vit kunnu ikki halda áfram við okkara ótálmaðu nýtslu av tí tilfeingi, ið finst á klótuni. Vit mugu finna alternativar og varandi orkukeldur, og vit mugu finna burðardyggar framleiðsluhættir, og vit mugu skipa flutning á sjógvi og landi eftir hesum meginreglum. Føroyingar mugu vísa ábyrgd. Vit eiga at taka við Kyoto sáttmálanum og seta ítøkilig tiltøk í verk fyri at minka um útlátið av vaktrarhúsgassum. Vit eins og allur heimurin eiga at lurta eftir Boga Hansen og øllum starvsfeløgum hansara kring allan heimin. Gott í teg Bogi - og góða eydnu víðari.

**Sosialurin**

## Vælsignaðu Jógvan á Lakjuni og Hans Pauli Strøm!

**EYDNA SKAALE OG RAGNAR VIÐ STREYM**
Foreldur

**Um tit ikki ætla at gjalda kostnaðin av at veita føroyskum smábørnum við serligum tørvi nøktandi hjálp, sigið so frá nú, so vit kunnu flyta til annað land, har vit fáa ta hjálp, okkum tørvar**

At hava serligan tørv. Hetta heitið sigur alt. Tá eitt barn hevur serligan tørv, so er tað øðrvísi enn onnur og hevur ávísa og serliga hjálp fyri neyðini.

Tíbetur hava vit møguleikarnar at nøkta henda serliga tørvi her á landi. Skúlin á Trøðni er ein stovnur, ið er gjørdur júst til tey børn, ið hava serligan tørv, og sum hevur fungerað sera væl.

Har er nógv serútbúgvið fólk, ið starvast innan ymisk serøki, t.d. fysioterapi, sjón, hoyrn, alternativa kommunikatión, talupedagogikk og socialpedagogikk, fyri at nevna nøkur. Ikki tykkum at siga, er tað ein stórur fyrimunur at hava so nógvar yrkisgreinar undir somu lon. Flestu av starvsfólkunum hava áravís av royndum, og tey hava øll hug og vilja at arbeiða við og hjálpa hesum børnunum.

Hølini eru góð og vælegnað, tí tey eru jú gjørd júst til endamálið. Har eru í rúgvuvís av stimbrandi amboðum, sum eru ætlað at nøkta serliga tørvin og hjálpa børnunum at koma fyri seg sum best.

Føroysk smábørn hava sostatt ein framúr møguleika at fáa hjálp til ta menning, sum tey ikki sjálv megna at skapa. Tey hava ein framúr møguleika at fáa eitt virðiligt og gott lív, har tað eru tey og teirra menningarstøði, ið seta dagskránna. Og tað sigur seg sjálvt, at jú fyrr byrjað verður, jú betri verður úrslitið.

**Skulu vit flyta av landinum?**

Tí er tað ógvuliga hugstoytt at frætta, at Skúlin á Trøðni ikki tekur ímóti øllum børnum við serligum tørvi. Avgerð er nevniliga tikin um, at dagligu tilboðini bert skulu vera galdandi fyri børn, ið eru 7 ár og eldri.

Hetta hevur ta vanlukkuligu avleiðing, at tað í løtuni eru nøkur heilt fá børn yngri enn 7 ár, ið ikki røkka aldursmarkinum, og verða slept upp á fjall. Vit eiga eitt teirra.

Tá sonurin ikki sleppur inn á einasta stovnin, ið er gjørdur til børn við serligum tørvi, hava vit tveir møguleikar eftir. Antin verur annað okkara heima og ansar soninum, ella fáa vit ein stuðul frá Almannastovuni, sum kann hava dreingin, ímeðan vit eru til arbeiðis.

Trupulleikin er bert, at hvørki vit ella ein stuðul frá Almannastovuni eru fakfólk. Vit kunnu gera okkara besta, men tað hjálpir ikki dreinginum við hansara menning. Vit duga ikki at nøkta hansara serliga tørv, tað mugu fakfólk til. Tí er hvørgin av møguleikunum ein nøktandi loysn.

Vit skilja á lagnum, at tað er ein spurningur um pengar. Men pengar skulu nýtast til dreingin óansæð – antin til mista arbeiðsinntøku til annað okkara, tí vit noyðast at vera heima hjá heilaskadda barni okkara, ella til ein stuðul. Hví ikki heldur nýta peningin, har hann veruliga ger mun?

Skúlastjórin hevur játtað at taka hesi børnini inn á skúlan, um bert peningalig játtan fylgir við. Og tað er greitt, at sonur okkara ikki kann bíða eftir hjálp til smábarnamenningina, inntil hann verður 7 ár.

Tá tað snýr seg um tað dýrabarasta, vit hava, kunnu vit ikki gera neyðsemjur. Serliga ikki, tá tað gongur út yvir menningina og harvið lívsmøguleikarnar og lívsgóðskuna hjá soni okkara.

Tí noyðast vit at spyrja: Vilja tit gjalda og geva lítla soni okkara ein møguleika? Ella skulu vit flyta og fáa neyðugu hjálpina uttanlands?

Við vón um skjótt svar.

## Virðingin fyri Føroya Løgtingi skot fyri bógvin

**GUNNLEIVUR DALSGARÐ,**
formaður
Starvsmannafelagið



Tað er við tungum huga, at felagið hevur lisið bræv tygara við avgerð um ikki yvirhøvur at reisa málið um at taka órinið frá løgtingsmanni, soleiðis sum felagið bað um.

Vit kunnu nú staðfesta, at tað, sum løgtingsmaðurin førdi fram frá tingsins røðarapalli um ein heilt ávísan part av tí arbeiðandi fjøldini, fellur innan fyri mark og kann saktans endurtakast frá tingsins røðarapalli.

Slíkt elvir til, at niðurgerð, illgitingar og skuldsetingar móti persónum í okkara samfelag, sum ikki hava møguleika at forsvara seg (og ikki ein gong sleppa at forsvara seg í rættinum), fara at halda fram, alt uttan at løgtingsins formanskapur letst um vón. Besta prógv um hetta er, at løgtingsmaður herfyri legði eftir einum uppaftur meira avmarkaðum parti av fólkinum, uttan at formaðurin yvirhøvur lat við seg koma.

Tað merkir, at í Føroyum í dag stendur tað løgtingslimum púra frítt, við formanskapsins góðtøku, at spilla partar av fólkinum út, uttan at tað fær nakrar fylgjur ella átalu, og uttan nakar sleppur at draga teir til svars fyri tað.

Vit staðfesta tí, at niðurstøðan frá formanskapinum, hevur givið virðingini fyri Føroya Løgtingi eitt álvarsamt skot fyri bógvin.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.